# STARVSLÝSING

**Starvið sum leiðari av Norðoya Kunningarstovu í Klaksvík, er við hesum leyst at søkja.**

**FØRLEIKi:**
Vit ynskja at tú:
- hevur áhuga fyri ferðavinnu og mentan
- verður við til at skipa ymisk tiltøk í mentanar- og ferðavinnuhøpi
- skapar tilboð til bæði føroyingar og útlendingar
- skapar tilboð bæði á sjógvi og landi
- hevur góð samstarvsevni við ferðavinnuna, vinnulívið og handilsumboð, Norðoyggjum at frama

Tú skalt duga væl at samskifta við fólk bæði á føroyskum, donskum og enskum, eisini skalt tú duga at nýta teldu á brúkarastøði.

Starvið er fulltíðarstarv, og fyrsta árið verður royndarár. Løn og setanartreytir sambært avtalu við nevndina.

Ferðavinnan í Norðoyggjum rekur Norðoya Kunningarstovu og Tjaldplássið úti í Grøv. Hølini har barnagarðurin Fjallafípan heldur til, leigar Klaksvíkar kommuna frá »Ferðavinnuni í Norðoyggjum«.

Skrivlig umsókn saman við CV verður at senda til:

**»Ferðavinnan í Norðoyggjum«**
Postboks 269
FO-700 Klaksvík

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. februar 2007.

Nevndin tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu umsóknir, ella ongan at seta í starv.

*Ferðavinnan í Norðoyggjum*
*Klaksvík hin 6. februar 2007*

# Søkt verður eftir Pedagogi

til at vera stuðul hjá barni í fyrsta flokki 20 tímar um vikuna, í Frítíðarskúlanum í Runavíkar kommunu, fram til 30-06-07. Frítíðarskúlin heldur til í gomlu læknahúsinum á Heiðavegi 22 Saltangará.

**Vit ynskja at umsøkjarin :**
- er íðin nærlagdur og álítandi
- dugir at samstarva við foreldur og arbeiðsfelagar
- hevur umsorgan og virðing fyri børnum og foreldrum
- dugir at taka støði í tørvinum hjá tí einstaka barninum
- er opin fyri avbjóðingum

Starvið verður sett 1. mars 2007.

**Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.**

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við leiðaran á tlf. 448594 lok.12 ella 216630.

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndum, skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mikudagin 21. februar 2007 kl.12.00.



**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
600 Saltangará

# TOYOTA
## reservedele

Vi kan tilbyde Danmarks største udvalg i nye og brugte reservedele til Toyota.

**Vi sender fra dag til dag til Færøerne.**

DKAUTO.DK
AUTOGENBRUG - SPECIALE TOYOTA
Flensborgvej 340 - 6200 Aabenraa
tlf. +45 7461 4110 - fax +45 7461 4164
email: salg@dkauto.dk - www.dkauto.dk

Forhenværende
Aabenraa Autogenbrug

ISO 9001 certificeret
DAG Dansk Autogenbrug - vi skåner miljø og økonomi
Autophuggernes DATALAGER DK

# Frá Tofta Arbeiðarafelag

Aðalfundur verður í hølum felagsins leygardagin 24.02.2007 kl. 16.00. Skrá sambært lógum felagsins.

Um limir hava uppskot til fundin, skulu hesi vera felagnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 16.02.2007.

***Nevndin***

TVØROYRAR KOMMUNA

# INNSKRIVING TIL FRÍTÍÐARSKÚLAN

Innskriving av børnum til Frítíðarskúlan í Trongisvági.

Børn ið skulu í frítíðarskúla til komandi skúlaár, kunnu verða innskrivað frá mikudegi 07.02.07.

**FRÍTÍÐARSKÚLIN**
Tlf.372750 - 225894

# Umboðsmannaval

Samb. grein 28 í høvuðssamtyktini verður val av umboðum til sjúkrakassan. Veljast skulu 1 umboð fyri Skopun, 1 fyri Sand og eitt fyri Húsavík/Dal.

Uppskot skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi áðrenn 28. februar.

**Sandoyar Sjúkrakassi**
210 Sandur



**Tín stóri dagur**

**Takka í Sosialinum**



## Leyst starv

**Skrivstovufólk til Tórshavnar Musikkskúla**

Søkt verður eftir einum skrivstovufólki til Tórshavnar Musikkskúlan at arbeiða 25 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.

Førleikakrøv: Umsøkjarar skulu hava skrivstovuútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og KAF.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 21. februar 2007.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Bo Isholm, musikkskúlaleiðara á tlf. 302470 ella Jákup Simonsen, mentamálaleiðara á tlf. 302010.

**Lesið meira um starvið á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

# Frásøgn frá Knút Nolsøe

Nú 30 ár eru liðin síðan eg, eftir áheitan, átók mær at boða donsku lógina um krígsendurgjald (krígspensjón) at vera galdandi fyri krígssigling við føroyskum skipum krígsárini 1940-45, loyvi eg mær at siga frá, at eg vegna aldur ikki longur kann átaka mær at ganga til handar og vegleiða viðvíkjandi krígsendurgjaldinum.

***Knút***